LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið
Tinghúsvegur 3
100 Tórshavn

19. oktober 2015
Mál: 0695-010/15-23
Viðgjørt: NF
Lógartænastan

**Løgtingsmál nr. 13 /2015: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar lóg um broyting í rættargangslógini fyri Føroyar (**Videoavhoyring av børnum og ungum í revsimálum)

**Uppskot**
**til**
**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar**
**lóg um broyting í rættargangslógini fyri Føroyar**
(Videoavhoyring av børnum og ungum í revsimálum)

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar niðanfyristandandi forslag lov om ændring af lov for Færøerne om rettens pleje (Videoafhøring af børn og unge i straffesager)

**Forslag**
**til**
**Lov om ændring af lov for Færøerne om rettens pleje**
**(Videoafhøring af børn og unge i straffesager m.v.)**

**§ 1**

I lov for Færøerne om rettens pleje, jf. lovbekendtgørelse nr. 148 af 9. marts 2004, som ændret ved lov nr. 529 af 6. juni 2007, § 1 i lov nr. 505 af 12. juni 2009, lov nr. 414 af 9. maj 2011, lov nr. 732 af 25. juni 2014 og § 1 i lov nr. 1492 af 23. december 2014, foretages følgende ændringer:

**1.** I § 100 indsættes efter stk. 2 som nyt stykke:
”*Stk. 3.* Rigsadvokatens afgørelse i en klagesag vedrørende strafforfølgning kan ikke påklages til justitsministeren. Tilsvarende gælder for afgørelser om aktindsigt efter forvaltningsloven og offentlighedsloven.”

Stk. 3 bliver herefter stk. 4.

**2.** Efter § 102 indsættes:

”**§ 102 a.** Fristen for klager over landfogdens (politimesterens) eller rigsadvokatens afgørelser vedrørende strafforfølgning er 4 uger efter, at klageren har fået meddelelse om afgørelsen. Fremkommer klagen efter udløbet af denne frist, skal den behandles, såfremt fristoverskridelsen må anses for undskyldelig.
*Stk. 2.* Stk. 1 finder tilsvarende anvendelse på klager over afgørelser om aktindsigt efter forvaltningsloven og offentlighedsloven.”

**3.** Efter § 172 indsættes:

”**§ 172 a.** En person, der er blevet videoafhørt efter § 745 a eller § 183, stk. 3, har ikke pligt til at afgive forklaring som vidne under hovedforhandlingen.
*Stk. 2.* Retten kan helt undtagelsesvis pålægge en person, der er omfattet af stk. 1, at afgive forklaring som vidne under hovedforhandlingen, hvis dette er af afgørende betydning for sagens afgørelse, og det ikke er tilstrækkeligt, at personen genafhøres til video.”

**4.** I *§ 173, stk. 1* og *2*, ændres ”§§ 169-172” til: ”§§ 169-172 a”.

**5.** I *§ 183, stk. 3,* indsættes efter 1. pkt.:
”I straffesager gælder dette endvidere for personer, der er blevet videoafhørt efter § 745 a, eller hvis retten bestemmer, at afhøringen af en person, som opfylder betingelserne i § 745 a, stk. 1, skal ske som videoafhøring.”

**6.** *§ 731 a* affattes således:

”**§ 731 a.** Inden en videoafhøring efter § 745 a eller § 183, stk. 3, skal der beskikkes en forsvarer for den, der er mistænkt eller senere måtte blive mistænkt i sagen, hvis den pågældende ikke selv har valgt en forsvarer, eller den valgte forsvarer udebliver.”

**7.** *§ 745 a, stk. 1,* ophæves, og i stedet indsættes:
”Politiets afhøring af en person kan optages på video med henblik på anvendelse af optagelsen som bevis under hovedforhandlingen efter § 877 a (videoafhøring), hvis personen er
1) under 13 år,
2) under 15 år, og efterforskningen vedrører en overtrædelse af
a) straffelovens § 210 eller kapitel 24 eller
b) straffelovens §§ 237 eller 244-246, hvor personen eller en af dennes nærmeste er forurettet, og den, der er mistænkt, er en af personens nærmeste,
3) under 18 år, og særlige omstændigheder taler for videoafhøring, eller
4) 18 år eller derover og har en alvorlig psykisk lidelse eller væsentlig funktionsnedsættelse, og særlige omstændigheder taler for videoafhøring.
*Stk. 2.* Forsvareren skal være til stede under videoafhøringen.”
Stk. 2 bliver herefter stk. 3.

**8.** I *§ 745 a, stk. 2,* der bliver stk. 3, udgår to steder ”eller sigtet”, og ”barnet” ændres til: ”personen”.

**9.** I *§ 745 a* indsættes som *stk. 4*:
”*Stk. 4.* Vil den, der er mistænkt, eller forsvareren modsætte sig, at videoafhøringen anvendes som bevis under hovedforhandlingen, skal den pågældende senest 4 uger efter videoafhøringens foretagelse indbringe spørgsmålet for retten. Retten kan se bort fra en fristoverskridelse, der må anses for undskyldelig.”

**10.** I *§ 748, stk. 1, 3. pkt.,* ændres ”afhøring af et barn, når retten efter § 183, stk. 3, har bestemt, at afhøringen skal optages på video” til: ”videoafhøring af en person efter § 183, stk. 3”.

**11.** *§ 877 a* affattes således:

”**§ 877 a.** En videoafhøring efter § 745 a eller § 183, stk. 3, kan anvendes som bevis under hovedforhandlingen.”

**§ 2**

*Stk. 1.* Loven træder i kraft den 1. april 2016.
*Stk. 2.* § 1, nr. 1 og 2, finder anvendelse for afgørelser, der er truffet efter lovens ikrafttræden.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1. Orsøkir til lógaruppskotið

Í tingsetuni 2013 viðgjørdi Løgtingið uppskot til ríkislógartilmæli um m.a. at broyta reglurnar í rættargangslógini viðvíkjandi videoavhoyring av børnum soleiðis, at videoavhoyring av børnum kann nýtast sum prógv í einum rættarmáli, umframt at tann ákærdi ella tann, sum er undir illgruna, ikki longur hevur rætt at vera til staðar undir eini videoavhoyring av børnum, sum eru 12 ár og yngri.

Undir viðgerðini í Løgtinginum var breið semja millum løgtingslimir um, at aldursmarkið fyri, nær eitt barn ella ungdómur kann vidoavhoyrast átti, at verið hægri enn 12 ár.

Í álitinum í tingmáli nr. 43/2013 sigur Rættarnevndin m.a. soleiðis: " ... Meirilutin er av tí fatan, at aldursmarkið fyri videoavhoyring av børnum átti at verið flutt úr 12 árum til 15 ár, m.a. fyri at verja barnið. Nevndin hevur í hesum sambandi spurt seg fyri og hevur fingið upplýst, at Justitsministeriet metir, at spurningurin um at hækka aldursmarkið er áhugaverdur og viðkomandi, men krevur tó eina nærri lýsing. Justitsministeriet hevur gjørt av sum heild at taka spurningin upp um at hækka aldursmarkið fyri videoavhoyring av børnum. Tað vil siga at kanna, lýsa og møguliga í framhaldi av hesum koma við eini lógarbroyting hesum viðvíkjandi. Justitsministeriet metir, at hetta arbeiðið kann verða liðugt seinast í 2014. Meirilutin heldur tað vera skilagott at bíða, til Justitsministeriet hevur lýst og grundgivið nærri fyri einari slíkari broyting, og grundað á hetta arbeiðið møguliga koma við eini lógarbroyting, um neyðugt". Minnilutin í Rættarnevndini metti, at aldursmarkið átti at vera hækkað úr 12 til 15 ár beinanvegin.

Løgmálaráðið fekk í mars 2015 *Strafferetsplejeudvalgets betænkning nr. 1554/2015 om videoafhøring af børn og unge i straffesager*. Frágreiðingin er hjáløgd sum fylgiskjal 2.

Lógaruppskotið um at hækka aldursmarkið fyri videoavhoyring til 15 ár er grundað á hesa frágreiðingina.

### 2. Galdandi lóggáva

Videoavhoyring av børnum merkir, at tann frágreiðingin, sum barnið gevur løgregluni, verður tikin upp á video fyri seinni at kunna verða víst í rættinum undir einum revsimáli í staðin fyri, at barnið skal geva frágreiðing í rættinum sum vitni. Videoavhoyring verður vanliga bara brúkt við avhoyring av børnum, sum er 12 ár og yngri.

Tað er serliga útbúgvin løgreglufólk, sum standa fyri avhoyringini av børnum, og tað ber til at hoyra og síggja avhoyringina í einum øðrum rúmi umvegis monitor (monitorrúmið). Avhoyringin fer fram í Barnahúsinum.

Endamálið við hesari mannagongd er at verja barnið og at fáa eina so treytaleysa og nágreiniliga frágreiðing frá barninum, sum til ber.

Tann, sum er undir illgruna ella skuldsettur, hevur ikki sjálvur rætt at vera hjástaddur, meðan avhoyringin fer fram, men verji hansara skal vera til staðar. Skuldsetti skal aftaná hava møguleika at síggja videoupptøkuna, og hann kann eisini biðja um nýggja avhoyring av barninum.

Eisini er ásett, at um ongin ávísur persónur enn er undir illgruna ella skuldsettur, so skal ein verji tilnevnast, áðrenn eitt barn verður videoavhoyrt.

Galdandi lóggáva er nærri útgreinað í donsku viðmerkingunum til lógaruppskotið, s. 7-15, fylgiskal 1.

### 3. Endamálið við lógaruppskotinum

Endamálið við lógaruppskoti er at betra um verjuna av børnum og ungum, sum verða hildin at hava verið fyri ella verið vitni til eitt álvarligt brotsverk. Hetta verður m.a. gjørt við at víðka um møguleikan at brúka videoavhoyring.

### 4. Stuttur samandráttur av nýskipanini viðvíkjandi videoavhoyring av børnum

Í dag verður videoavhoyring vanliga einans brúkt, um barnið er 12 ár ella yngri.

Við hesum lógaruppskotinum verður møguleikin at brúka videoavhoyring víðkað til eisini altíð at kunna verða brúkt viðvíkjandi børnum, sum eru 13-14 ár, tá talan er um revsimál um siðabrotsverk, blóðskemd ella harðskap, framdan í familjuni. Sí nærri lýsing í donsku viðmerkingunum til lógaruppskotið, s. 15-22, fylgiskal 1.

Eisini skulu ung undir 18 ár í serligum førum kunna videoavhoyrast í staðin fyri at geva frágreiðing beinleiðis í rættinum.

Børn, sum eru 13-14 ár, eiga í øðrum málum enn revsimálum um siðabrotsverk, blóðskemd ella harðskap, framdur í familjuni, eins og ung í aldrinum 15-17 ár at geva frágreiðing í rættinum. Tað eigur einans í serligum førum at verða brúkt videoavhoyring í hesum førum. Sí nærri í donsku viðmerkingunum til lógaruppskotið, s. 22-26, fylgiskjal 1.

Persónar, 18 ár og eldri, kunnu eisini videoavhoyrast, um persónurin hevur álvarslig sálarlig brek ella virkistarn, og serligar umstøður tala fyri videoavhoyring. Hetta hevur verið loyvt fyrr, men verður nu beinleiðis ásett í lógini. Sí nærri í donsku viðmerkingunum til lógaruppskotið, s. 26, fylgiskjal 1.

Herumframt verður tað eisini ásett, at børn og ung, sum eru videoavhoyrd, skulu sleppa undan at geva vitnisfrágreiðing undir viðgerðini av málinum í rættinum. Sí nærri í donsku viðmerkingunum til lógaruppskotið, s. 27-29, fylgiskjal 1.

Tað verður ásett í lógaruppskotinum, at ein verji ella skuldsettur, sum vil mótmæla at videoavhoyring verður brúkt sum prógv, kanska tí at hildið verður, at treytirnar fyri videoavhoyring ikki vóru loknar, sum meginregla skal leggja spurningin fyri rættin í seinasta lagi 4 vikur aftaná, at videoavhoyringin varð gjørd. Hetta er fyri at tann videoavhoyrdi skjótast til ber skal fáa greiðu á, um viðkomandi skal geva frágreiðing í rættinum ella ikki. Sí nærri í donsku viðmerkingunum til lógaruppskotið, s. 29-30, fylgiskjal 1.

Eisini verður ásett, at avgerðir hjá ákærumyndugleikanum viðvíkjandi revsiforfylging einans kunnu kærast til næsta yvirskipaða myndugleika, sum er Ríkisadvokaturin. Kærufreistin er 4 vikur. Í dag kunnu avgerðir hjá Ríkisadvokatinum kærast víðari til Løgmálaráðið. Eisini verður skotið upp, at tað sama skal galda fyri kæru um avgerðir hjá ákærumyndugleikanum um innlit sambært forvaltningsloven og offentlighedsloven. Hendan skipanin hevur verið galdandi í Danmark síðani 1992. Sí nærri um hetta í donsku viðmerkingunum til lógaruppskotið, s. 34-37, fylgiskjal 1.

Lógaruppskotið við viðmerkingum, sum Løgmálaráðið hevur gjørt, er hjálagt sum fylgiskjal 1. Her er nærri og gjøllari lýsing av málinum. Eisini er ein javntekstur (bilag 1) á s. 56-61

Rættarstøðan í hinum Norðanlondum er nærri lýst á s. 79-96 í Betænkning nr. 1554/2015 om videoafhøring af børn og unge i straffesager, fylgiskjal 2.

## 5. Ummæli

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Mentamálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Barnaverndarstovu Føroya, Barnaumboðnum (LUM), Barnabata, Amnesty International, Advokatfelag Føroya, Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar, Meginfelag teirra brekaðu MBF, Føroya Lærarafelag, Felagnum Heim og skúli og Føroya Pedagogfelag.

Av tí, at talan er um ríkislógaruppskot, hevur Løgmálaráðið sjálvt sent uppskotið til ummælis hjá Sorinskrivaranum og Fútanum, av tí at hetta eru danskir myndugleikar í Føroyum. Eisini er uppskotið sent til ummælis hjá Domstolsstyrelsen, Ríkisadvokatinum og Ríkispolitinum.

Ummæli er komið frá Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Mentamálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Barnaverndarstovu Føroya, Barnaumboðnum (LUM), Barnabata, Meginfelag teirra brekaðu MBF, Føroya Lærarafelag, Sorinskrivaranum, Fútanum, Ríkisadvokatinum, Domstolsstyrelsen og Ríkispolitinum.

*Almannamálaráðið, Mentamálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Barnaumboðið (LUM), Føroya Lærarafelag, Sorinskrivarin, Fútin, Ríkisadvokaturin, Domstolsstyrelsen og Ríkispolitiið* hava ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

*MBF, Meginfelag teirra, ið bera brek í Føroyum*, tekur undir við uppskotinum og fegnast um, at aldursmarkið fyri videoavhoyring av børnum verður broytt frá 12 ár til børn 15 ár og yngri. Felagið fegnast somuleiðis um at videoavhoyring eisini kann verða brúkt til persónar 18 ár og eldri, um persónurin hevur álvarslig sálarlig brek ella virkistarn, og serligar umstøður tala fyri videoavhoyring.

*Heilsumálaráðið* heldur, at skipanin ikki eigur at avmarkast til revsimál um siðabrotsverk, blóðskemd ella harðskap, framdan í familjuni, men at tað altíð skal vera loyvt at videoavhoyra børn undir 15 ár í málum, har barnið sjálvt hevur verið fyri harðskapi, framdan av fremmandum, og har barnið hevur verið vitni til harðskap, framdan av foreldrum ella systkjum móti fremmandum. Heilsumálaráðið heldur eisini, at barnið altíð eigur at fáa nøktandi kunning og vegleiðing um sína rættarstøðu og væntaðu gongdina í málinum á ein slíkan hátt, sum barnið hevur møguleika fyri at skilja.

*Barnaverndarstovan* heldur, at aldursmarkið er í lægra lagi vísandi til §§ 39 og 40 í Barnarættindasáttmálanum, har eitt barn er ein persónur undir 18 ár. Barnaverndarstovan heldur, at aldursmarkið fyri videoavhoyringar eigur at vera samsvarandi hesum, ella so nær við tað, sum til ber, tá talan er um kynsligan ágang og annan harðskap.

*Barnabati* mælir til, at børn og ung undir 18 ár skulu kunna videoavhoyrast í serligum førum. Víst verður til, at sambært fleiri altjóða sáttmálum er eitt barn allýst sum ein persónur undir 18 ár.

**Viðmerking frá Løgmansskrivstovuni:**

1) Tilmæli hjá ummælispørtum um at víðka brúkið av videoavhoyring eisini til onnur revsimál enn revsimál um siðabrotsverk, blóðskemd ella harðskap, framdan í familjuni:

Meginreglan er, at vitnir í revsimálum skulu møta persónliga í rættinum at geva frágreiðing. Prinsippið um beinleiðis prógvførslu hevur til endamál at geva rættinum best møguligt grundarlag fyri at meta um vitnisfrágreiðingarnar og at taka røttu avgerðina í revsimálinum.

Videoavhoyring av børnum er eitt undantak til hesa reglu og er grundað á eina vigan av atlitinum at beinleiðis prógvførslu og møguleikan hjá ákærda at varða um sína verju upp móti atlitinum at verja barnið ella tann unga og atlitinum at fáa eina so treytaleysa og nágreiniliga frágreiðing frá barninum ella tí unga, sum til ber. Sí nærri í donsku viðmerkingunum s. 15-18, fylgiskjal 1.

Tað sæst í donsku viðmerkingunum til lógaruppskotið s. 19-22, fylgiskjal 1, at Løgmálaráðið er samt við Strafferetsplejeudvalget í, at brúk av videoavhoyring av børnum einans eigur at verða víðkað til tey føri, har atlitið at verja barnið ella tann unga vigar serstakliga tungt. Sagt verður, at revsimál um siðabrotsverk, blóðskemd ella harðskap, framdur í familjuni, verða mett at vera serstakliga tyngjandi fyri børn og ung, og tí er videoavhoyring avmarkað til hesi revsimál.

Tað er sett inn ein savningaráseting í § 745 a, stk. 1, nr. 3, har børn og ung undir 18 ár kunnu videoavhoyrast, tá serligar umstøður tala fyri hesum.

2) Tilmæli um, at børn og ung undir 18 ár altíð skulu videoavhoyrast:

Tað sæst í donsku viðmerkingunum s. 20, fylgiskjal 1, at tilmælið um 15 ára aldursmark fyri videoavhoyring í ávísum sera tyngjandi málum er grundað á, at hetta eisini er seksuelli lógaldurin. Tað er tí viðkomandi fyri rættin at skula taka støðu til, um talan kann vera um sjálvboðið seksuelt samband, og hetta gerst best við eini beinleiðis prógvførslu fyri rættinum.

Løgmansskrivstovan er samd við Løgmálaráðið og Strafferetsplejeudvalget og teirra meting og tilmæli um, í hvønn mun videoavhoyring av børnum kann víðkast. Talan er um fakliga væl grundað og umhugsað tilmæli, har atlitið til meginregluna um beinleiðis prógvførslu og møguleikan hjá ákærda at varða um sína verju er vigað upp móti atlitinum at verja børn og ung mest møguligt í ávísum serliga tyngjandi málum.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Tað er væntandi, at tað fara at verða gjørdar fleiri videoavhoyringar, tá lógin verður víðkað til eisini at fevna um m.a. avhoyring av børnum, yngri enn 15 ár, í revsimálum um siðabrotsverk, blóðskemd ella harðskap, framdur í familjuni. Hetta kann møguliga hava við sær økt arbeiðistrýst á Barnahúsið og á tey løgreglufólk, sum skulu gera avhoyringarnar.

### 2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær stórvegis umsitingarligar avleiðingar. Møguliga kann uppskotið hava við sær nakað økt arbeiðstrýst á virksemið í Barnahúsinum.

### 3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið verður hildið at hava positivar avleiðingar fyri tey børn, ung og fólk, ið bera brek, sum við lógaruppskotinum fáa møguleika at vera videoavhoyrd í staðin fyri at skulu geva frágreiðing beinleiðis í rættinum

Lógaruppskotið verður eisini hildið at hava negativar avleiðingar fyri persónar, sum eru skuldsettir ella ákærdir, tí verjin tá ikki sum vanligt hevur møguleika beinleiðis at avhoyra vitnir í revsimálinum.

### 7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Tað eru fleiri millumtjóðasáttmálar, sum serstakliga verja rættindi hjá børnum á ymiskan hátt.

Hesir eru í fleiri førum galdandi fyri Danmark, men fevna ikki um Føroyar, sum sostatt ikki eru bundar av hesum sáttmálum. Tað er tó onki til hindurs fyri, at vit velja sjálvboðið at fylgja sáttmálunum. Ásetingarnar í hesum lógaruppskotinum eru í samsvari við ásetingarnar í hesum altjóða sáttmálum.

Serliga er talan um *Europarådets konvention af 25. oktober 2007 om beskyttelse af børn mod seksuel udnyttelse og seksuelt misbrug*. Her er ásett, at sum barn verður roknaður ein persónur, sum er undir 18 ár. Eisini eru ásetingar um avhoyring av børnum, undir hesum videoavhoyring. Sáttmálin er ikki settur í gildi fyri Føroyar.

Tað er í lógaruppskotinum ásett, at børn, sum eru 13-14 ár, í øðrum málum enn revsimálum um siðabrotsverk, blóðskemd ella harðskap, framdur í familjuni, og ung í aldrinum 15-17 ár eiga at geva frágreiðing í rættinum. Tað eigur einans í serligum førum at verða brúkt videoavhoyring av hesum børnum. Hetta er ásett í § 745 a, stk. 1, nr. 1.

Hendan savningarásetingin verður hildin at vera í samsvari við nevnda sáttmála.

*FN-konvention af 20. november 1989 om Barnets Rettigheder* hevur verið í gildi fyri Føroyar síðani 11. mai 1993. Ásetingarnar í hesum lógaruppskotinum eru ikki ósambæriligar við sáttmálan, og lógaruppskotið verður hildið at stuðla undir grein 12, stk. 2, sum sigur soleiðis:

“Artikel 12

1. Deltagerstaterne skal sikre et barn, der er i stand til at udforme sine egne synspunkter, retten til frit at udtrykke disse synspunkter i alle forhold, der vedrører barnet; barnets synspunkter skal tillægges passende vægt i overensstemmelse med dets alder og modenhed.

2. Med henblik herpå skal barnet især gives mulighed for at udtale sig i enhver behandling ved dømmende myndighed eller forvaltningsmyndighed af sager, der vedrører barnet, enten direkte eller gennem en repræsentant eller et passende organ i overensstemmelse med de i national ret foreskrevne fremgangsmåder. “

Samanumtikið verður mett at tað eru ongir millumtjóðasáttmálar á økinum, sum hava fleiri fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar enn frammanundan. Tvørturímóti stuðlar uppskotið og í nøkrum førum gevur tað betri sømdir enn tær, sum Føroyar eru bundnar til at geva sambært teimum altjóða sáttmálum, sum eru galdandi fyri Føroyar.

**8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

*Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS,* Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

Í mun til hetta lógaruppskotið er tað viðkomandi at eftirkanna, um uppskotið er sambæriligt við grein 6 í Mannarættindasáttmálanum.

Grein 6 í EMRS er soljóðandi:

Artikel 6

Ret til retfærdig rettergang

*Stk. 1.* Enhver har ret til en retfærdig og offentlig rettergang inden en rimelig frist for en uafhængig og upartisk domstol, der er oprettet ved lov, når der skal træffes afgørelse enten i en strid om hans borgerlige rettigheder og forpligtelser eller angående en mod ham rettet anklage for en forbrydelse. Dommen skal afsiges i et offentligt møde, men pressen og offentligheden kan udelukkes helt eller delvis fra retsforhandlingerne af hensyn til sædeligheden, den offentlige orden eller den nationale sikkerhed i et demokratisk samfund, når det kræves af hensynet til mindreårige eller til beskyttelse af parternes privatliv, eller under særlige omstændigheder i det efter rettens mening strengt nødvendige omfang, når offentlighed ville skade retfærdighedens interesser.

*Stk. 2.* Enhver, der anklages for en lovovertrædelse, skal anses for uskyldig, indtil hans skyld er bevist i overensstemmelse med loven.

*Stk. 3.* Enhver, der er anklaget for en lovovertrædelse, skal mindst have ret til følgende:

a) at blive underrettet snarest muligt, udførligt og på et sprog, som han forstår, om indholdet af og årsagen til den sigtelse, der er rejst mod ham;

b) at få tilstrækkelig tid og lejlighed til at forberede sit forsvar;

c) at forsvare sig personligt eller ved bistand af en forsvarer, som han selv har valgt, og, hvis han ikke har tilstrækkelige midler til at betale for juridisk bistand, at modtage den uden betaling, når dette kræves i retfærdighedens interesse;

d) at afhøre eller lade afhøre imod ham førte vidner og at få vidner for ham tilsagt og afhørt på samme betingelser som vidner, der føres imod ham;

e) at få vederlagsfri bistand af en tolk, hvis han ikke forstår eller taler det sprog, der anvendes i retten.

Tað sæst, at EMRS ásetir, at øll, sum eru ákærd fyri at hava framt eitt brotverk, hava rætt til rættvísan rættargang. Sambært grein 6, stk. 3, litra d hevur ein persónur rætt at avhoyra ella lata avhoyra vitnir, sum vitna ímóti honum, umframt rætt til sjálvur at innkalla og avhoyra vitnir.

At brúka videoavhoyring sum prógv undir einum rættarmáli kann sostatt tykjast at vera í andsøgn við hesa áseting.

Mannarættindadómstólurin hevur í síni siðvenju góðkent, at videoavhoyring hevur verið brúkt sum prógv í staðin fyri beinleiðis frágreiðing í rættinum í revsimálum um seksuel brotsverk móti børnum. Avgerandi er, um hesin hátturin kann sameinast við eina nøktandi og effektivari útinnan av rættindunum hjá verjuni.

Tann hátturin, sum videoavhoyring er skipað hjá okkum, har verjin hevur rætt at vera hjástaddur og at seta spurningar, umframt at verjin kann biðja um nýggja avhoyring, ger, at tað verður mett, at ásetingarnar í lógini eru í samsvari við grein 6 í EMRS.

Sí annars nærri útgreining um hetta í betænkning 1554/2015, s. 58-65, sum er hjáløgd sum fylgiskjal 2.

*Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

Í § 745 a, stk. 1, nr. 4 í uppskotinum er ásett, at videoavhoyring kann brúkast, um persónurin er 18 ár ella eldri og hevur álvarslig sálarlig brek ella týðandi virkistarn, og serligar umstøður tala fyri videoavhoyring.

Hendan ásetingin, sum loyvir, at tað eisini er møguligt at videoavhoyra fólk, ið bera brek, stuðlar undir grein 13 í Breksáttmálanum um atgongd til rættarskipanina, har tað í nr. 1 stendur soleiðis:

> ”Limalondini skulu tryggja fólki, ið bera brek, at tey á jøvnum føti við onnur fáa brúkt rættarskipanina, og gera tillagingar í mannagongdum og sum hóska til aldurin, við tí fyri eyga at lætta um, um tey, eisini sum vitni, verða beinleiðis ella óbeinleiðis partar í rættarmálum, á kanningarstigi og øðrum fyrireikandi stigum eisini."

Eisini verður ásetingin mett at vera í samsvari við grein 17 í Breksáttmálanum um at verja sjálvræðisrætt (integritet) hins einstaka, ið er soljóðandi:

> ”Ein og hvør, ið ber brek, hevur rætt til virðing fyri sínum likamliga og sálarliga sjálvræðisrætti (integriteti) á jøvnum føti við onnur.”

## 9. Marknaforðingar

Marknaforðingar eru lógir, almennar reglur og siðvenjur, ið tarna flytføri hjá tí einstaka ella møguleikanum hjá fyritøkum at virka um landamørk í Norðurlondum.

Mett verður ikki, at hetta uppskotið hevur við sær nakar marknaforðingar ella kann tarna flytføri hjá tí einstaka borgaranum ella kann ávirka umstøðurnar hjá fyritøkum at virka um landamørk í Norðanlondum ella millum Føroyar, Danmark og Grønland.

**Yvirlit yvir avleiðingar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | //////////////////////////////////////////////// | | Nei | Ja | ////////////////////// |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### Til § 1.

Viðvíkjandi serligu viðmerkingunum til tær einstøku greinirnar verður víst til danska uppskotið s. 40-55, fylgiskjal 1.

**Til § 2.**

Lógarbroytingin skal koma í gildi 1. apríl 2016.

Løgmansskrivstovan, 19. oktober 2015

**Aksel V. Johannesen**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir

**Hjáløgd fylgiskjøl:**

Fylgiskjal 1. Bemærkninger til lovforslaget og paralleltekst
Fylgiskjal 2. Betænkning nr. 1554/2015 om videoafhøring af børn og unge i straffesager
Fylgiskjal 3. Ummæli frá Almannamálaráðnum, dagfest 20. juli 2015
Fylgiskjal 4. Ummæli frá Heilsumálaráðnum, dagfest 22. juli 2015
Fylgiskjal 5. Ummæli frá Mentamálaráðnum, dagfest 16. september 2015
Fylgiskjal 6. Ummæli frá Fíggjarmálaráðnum, dagfest 23. september 2015
Fylgiskjal 7. Ummæli frá Barnaverndarstovu Føroya, dagfest 23. juli 2015
Fylgiskjal 8. Ummæli frá Løgtingsins umboðsmanni, Barnaumboðnum, dagfest 23. juli 2015
Fylgiskjal 9. Ummæli frá Barnabata, dagfest 16. september 2015
Fylgiskjal 10. Ummæli frá Meginfelag teirra, ið bera brek, MBF, dagfest 16. september 2015
Fylgiskjal 11. Ummæli frá Føroya Lærarafelag, dagfest 16. september 2015
Fylgiskjal 12. Ummæli frá Sorinskrivaranum, dagfest 30. juli 2015
Fylgiskjal 13. Ummæli frá Ríkisadvokatinum og Fútanum, dagfest 5. august 2015
Fylgiskjal 14. Ummæli frá Domstolsstyrelsen, dagfest 24. juli 2015
Fylgiskjal 15. Ummæli frá Ríkispolitinum, dagfest 29. juli 2015